TÍ‹INDI

Agip letur upp skrivstovu

OLJULEITING
Jan Müller

Italska oljufelagi› Agip, sum hevur fingi› leitloyvi í Føroyum, fer í næstum at lata upp skrivstovu í Havn. Hetta ver›ur helst í november. Felagi›, sum hevur bundi› seg til at bora ein brunn í loyvinum ta› hevur fingi› saman vi› føroyska felagnum Føroya Kolvetni, fer ikki at bora fyrr enn í ár 2002 sigur Ron Lansdell, i› er settur sum stjóri fyri leitingini í føroyskum øki.

Teir fara tí at bí›a vi› at seta fleiri fólk á skrivstovuni fyrr enn ta› nærkast tí›ini, tá teir fara at bora. Kortini ver›ur brúk fyri fólki á skrivstovuni og ver›ur í hesum sambandi søkt eftir fólki júst í hesum døgum. Agip hevur royndir at bora á djúpum vatni fleiri sta›ni í heiminum og metir ta› ikki sum nakran trupulleika at fáa fatur á einum boripalli til ta tí›.

Nú oljufeløgini siga frá, nær og hvar tey fara at bora, hevur Agip gjørt av at kalla sítt prospekt, tvs. øki í undirgrundini, sum teir fara at seta borin í, fyri "Marimas".

Ron Lansdell vil einki siga um, antin teir eru í samrá›ingum vi› onnur oljufelag, sum kunnu hugsa sær at vera vi› í samtakinum, sum Agip er operatørur fyri.

Hvat vi›víkur oljuútger›arhavnini so metir Agip ta› vera mest umrá›andi at velja eina havn, sum hóskar best til tekniska og logistiska tørvin hjá felagnum og sum búskaparliga er ta› skilabesta vali›.

Statoil borar í Pegasus í juni

Gongst sum ætla› ver›ur uttan iva fyrsti brunnurin á føroyska landgrunninum bora›ur longu í juni mána› næsta ár tvs. um gott og væl eitt hálvt ár

OLJULEITING
Jan Müller

-Vit ætla at bora í juni, men endaliga avger›in fellur í november, tá vit og samstarvsfeløgini skulu hava fund sigur John Inderhaug, stjóri í Statoil og oddama›urin í oljusamtakinum Statoil, Phillips Petroleum, Veba og Enterprise.

Sáttmáli er gjørdur vi› oljupallfelagi› Transocean um leigu av boripallinum Sovereign Explorer, ein gamal kenningur á Atlantsmótinum. Pallurin hevur veri› brúktur til at bora nógvar brunnar á djúpum vatni millum Føroyar og Hetland.

John Inderhaug uppl‡sir, at teir fara at bora á 1000 metrar d‡pi í einum tertierprospekti í undirgrundini, sum teir hava valt at kalla Pegasus. Ta› er navni› á tí kenda hestinum í grikska mytologiini. Ta› er í teiginum 6005/19. Statoilsamtaki› hevur bundi› seg til at bora tveir brunnar í tí loyvi ta› hevur fingi› í 1. útbjó›ing. Hin brunnurin ver›ur bora›ur í einum prospekti, sum hevur fingi› fiskanavni› Longan. Henda boringin ver›ur tó ikki gjørd fyrr enn feløgini hava savna› saman meira 3D seismikk. Teir ætla at skjóta 3D seismikk í summar og sí›ani skal hann tulkast. John Inderhaug sigur, at teir umhugsa at fara djúpri ni›ur í undirgrundina í hesi boringini.

Ta› hevur annars veri› rættiliga óvist, um Statoilbólkurin fór at bora næsta summar. Nú hevur ta› so eydnast at fáa ein boripall, og ta› broytir helst heilt myndina.

Hvussu lovandi - prospektivt - er so Pegasusprospekti›?

-Vit rokna vi›, at vit hava relativt gó›ar møguleikar at finna olju har og vóna at raka vi› olju longu í 1. boring. Eru vit hepnir, so kann ver›a talan um fund á stødd vi› Foinaven og Schiehallion á bretskum øki.

Hvat vi›víkur nøvnum á prospektum og keldum, so skilur Sosialurin, at ver›ur olja funnin og talan er um eitt lønandi felt, so fær hetta eitt heilt n‡tt navn - til ta tí›. Sokalla›a prospektnavni› (tvs. ta› øki› teir síggja í undirgrundini og sum bora› ver›ur í) ver›ur sjáldan heiti› á sjálvari oljukelduni.



Sovereign Explorer ver›ur helst tann pallurin, sum ver›ur fyrstur at bora í føroysku undirgrundini næsta ár

Velja oljuhavn á handilsligum grundarlag

Hóast ta› eru tey, sum enn ivast í í hvussu stóran mun oljufeløgini fara at brúka føroyskar vørur og tænastur í sambandi vi› komandi oljuleiting sigur John Inderhaug, stjóri í Statoil, at hetta er ein spurningur teir vi›gera vi› størsta álvarsemi

OLJA OG FØROYSK LUTTØKA
Jan Müller



John Inderhaug, leitistjóri Statoil: -Spurningurin um føroyskar vørur og tænastur ver›ur tikin í størsta álvara

Men kjarnin í hesum er at royna at taka føroysku virkini vi› inn í gongdina so tí›liga tilber ta løtuna tú hevur tiki› avger›ina um at bora. Solei›is at fyritøkurnar skulu hava møguleika at fyrireika seg naka›. John Inderhaug vi›gongur, at "det er vældig kort tid", um avger› ver›ur tikin í november um at bora í juni.

Um slag av tænastum talan ver›ur um, so ver›ur ta› mest flutningur og tænastur, sum hava tilkn‡ti til eina oljuúter›arhavn. Sí›ani er ta› eisini spurningurin um, í hvussu stóran mun føroyskar fyritøkur kunnu veita specialtænastur.

Ein spurningur, sum hevur veri› rættiliga nógv frammi í or›askiftinum í Føroyum, er máli› um oljuútger›arhavnina. John Inderhaug sigur, at vali› av "oljubasa" má byggja á handilsligt (forretningsmæssigt) grundarlag. Hetta er í hvussu er stø›an hjá Statoil. Og í tí sambandi er møguleiki fyri, at øll fyristø›ufeløgini (operatørarnir) gera eitt samstarv, har tey á handilsligum grundarlag taka av tí eftir teirra tykki besta tilbo›num. Sosialurin skilur, at fundir hava veri› millum feløgini um m. a. eitt slíkt samstarv, men eingin avger› er tikin enn. Ta› vanliga í slíkum føri er fyrst ein prekvalifisering eftirfylgd av eini útbo›srundu. Tvs. at ávikavist Sund, Runavík og Drelnes mugu koma vi› hvør sínum tilbo›i til útger›arvirksemi í sambandi vi› leitingina, á›renn oljufeløgini taka avger›ina.

John Inderhaug sigur, at ta› í dag er ov tí›liga at siga naka› ítøkiligt um, hvat pláss í Føroyum er best egna› til eina komandi oljuútger›arhavn. Fyri at kunna svara tí mást tú bæ›i hava eina prekvalifisering og eina útbo›srundu.

Stutt tí› men klára ta›

Stjórin í Statoil vi›gongur, at "det blir et vældig tæt løb" fyri at fáa hesi tingini uppá pláss, nú bert gott og væl eitt hálvt ár er til teir skulu bora. Men hann roknar vi›, at teir klára at fáa bæ›i eina prekvalifisering og eina útbo›srundu til ta tí›. Hetta treytar tó eisini eitt sera gott samstarv vi› myndugleikarnar, naka›, sum hann ikki ivast í ber til.

John Inderhaug vil ikki sjálvur her og nú geva naka› bo› uppá, hvat pláss hann heldur vera best egna› til oljuútger›arhavn. Hann váttar tó, at í sambandi vi› Oljurá›stevnuna í Nor›urlandahúsinum í hesum døgum koma fólk frá Statoil til Føroya fyri m.a. at hyggja at basaumstø›unum.

Uppá fyrispurning um ta› ver›a føroyingar umbor› á Sovereign Explorer, tá teir fara at bora um einar 8 mána›ir, sigur John Inderhaug, at ta› vilja teir í hvussu er royna, men ta› veldst so aftur um, um ta› finst kvalifisera› fólk til hetta arbei›i›. Teir leggja dent á at fáa føroyska vinnulívi› vi› í ta› arbei›i›, sum skal gerast í sambandi vi› komandi boring.

John Inderhaug sigur, at so skjótt teir hava fingi› grønt ljós frá ovastu lei›sluni at áseta boridagin í næsta ár, og ta› ver›ur helst í næsta mána›, so fara teir at taka upp dialog vi› vinnuna í Føroyum fyri at vita, hvørjar uppgávur hon kann átaka sær.

Statoil, sum skal taka sær av boringini, er vi› at fáa fast undir fótum í Føroyum og hevur søkt eftir skrivtovuhøli og íbú›um. Tá borivirksemi› nærkast fara tey at ver›a eini 10 fólk á skrivstovuni, føroyingar og útlendingar. Statoilstjórin veit ikki í løtuni, hvørji størv føroyingar kunnu hugsast at átaka sær.



Fyrsta boringin vi› Føroyar næsta ár ver›ur í Pegasus-prospektinum í teiginum 6005/19 á 1000 metra d‡pi. Sí píl.

TÍ‹INDI

Tey tr‡, sum hava tiki› stig til og arbeitt vi› oljurá›stevnuni, sum letur upp í Nor›urlandahúsinum í dag: Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, Magni Arge, forma›ur í Oljubólkinum hjá Vinnuhúsinum og Ingvør Nolsøe, stjóri í Stepfanssons Húsi. Mynd Jens K. Vang

Føroyskt vinnulív skal vera vi›

- Okkara endamál vi› rá›stevnuni er at gera útlendsku luttakarunum greitt ella minna teir á, hvørjar treytirnar eru. Føroysk vinna er áhuga› í at fáa at vita, hvussu feløgini ætla at liva upp til hesar treytir sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum

OLJULEITING OG VINNULÍV
Jan Müller

Í dag letur upp stóra oljurá›stevnan í Nor›urlandahúsinum, sum Vinnuhúsi› og Stepfansons Hús skipa fyri. Vit spurdu Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, hvussu ta› ber til, at teir hava tiki› stig til hesa rá›stevnuna. Hann vísir á, at eftir at hugskoti› til at skipa eina slíka rá›stevnu í Føroyum kom fram frá fleiri sí›um tók Oljubólkurin hjá Arbei›sgevarafelagnum hetta til sín og gjørdi av at gera hugskoti› til veruliga - í samstarvi vi› Stephanson Hús, sum tekur sær av tí praktiska.

Oljubólkurin, sum hann her sipar til, var› stovna›ur í 1996. Valdir vór›u 10 persónar umbo›andi ymsar partar av vinnuni og sum hava virksemi, i› náttúrliga hevur vi› eina oljuvinnu at gera. Forma›ur í bólkinum er Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.

Endamáli› vi› rá›stevnuni var at seta ljóskastaran á, hvat kemur at henda, nú leiting stendur fyri framman og at fáa oljufeløgini "út úr buskinum" tvs. at siga, hvat tey ætla, solei›is at føroysk vinna kann ver›a kunna› so skjótt tilber. -Ta› er tó ikki fyrr enn 17. november, at oljufeløgini skulu lata sínar neyvu arbei›sætlanir til Oljumálast‡ri›, men vit hava rokna› vi›, at eitt sta› á›renn ta› hava tey gjørt sær greitt, hvat tey ætla sigur Jan Mortensen, sum vísir á, at nettupp tí var› stevnan løgd nú.

Føroysk vinna vi›

Ætlanin er at fáa fyristø›ufeløgini at grei›a frá, hvat tey ætla og hvussu tey hvør í sínum lagi vilja lúka tær loyvistreytir, sum eru settar. Og har fyrireikarnir av rá›stevnuni hava serligan áhuga í at vita, hvussu feløgini koma at liva upp til vinnutreytirnar, har ta› ver›ur sagt, at føroysk vinna skal takast vi› í so stóran mun sum gjørligt.

-Okkara endamál vi› rá›stevnuni er at gera útlendsku luttakarunum greitt ella minna teir á, hvørjar treytirnar eru. Føroysk vinna er áhuga› í at fáa at vita, hvussu feløgini ætla at liva upp til hesar treytir sigur Jan Mortensen.

Uppá fyrispurning um møguleiki ikki er fyri, at føroyingar kunnu koma at krevja ov nógv av útlendsku oljufeløgunum enn rímuligt er sigur Jan Mortensen, at alt hetta kann tykjast rúgvusmiki›, men hyggur man eftir, hvat er gjørt í Noregi og a›rasta›ni, so eru okkara krøv og treytir ikki ø›rvísi enn ta› onnur hava gjørt.

-Ta› oljufeløgini skulu gera tekur útgangsstø›i í okkara samfelag. Ta› er okkara landgrunnur feløgini skulu bora í. Ta› eru meira enn 30 ár sí›ani, at oljuvinnan tók seg upp í Nor›sjónum, og vit hava eina oljuvinnu rundan um okkum vi› nógvum feløgum, sum eru kompetent til at loysa uppgávur. Um vit ikki góvu okkum sjálvum nakrar fyrimunir, so hev›i ta› veri› sera trupult hjá okkum at komi› inn í hesa fyri okkum n‡ggju vinnu.

Blástemplan at vera vi›

-Men man ta› fyri oljufeløgini í mongum førum ikki kennast sum at fara yvir um ánna eftir vatni og at skula uppfinna hjóli› av n‡ggjum, tá tey skulu til at brúka n‡ggjar veitarar, sum als ikki hava arbeitt í hesi vinnu á›ur?

-Í summum føri vil ta› hjá teimum vera at fara yvir um ánna eftir vatni. Men hjá okkum vil ta› vera ein møguleiki at koma inn í eina heilt n‡ggja vinnugrein, sum gevur okkara vinnu altjó›a royndir og gevur møguleika at fáa referansir, sum kunnu brúkast í ø›rum høpi. Man kann fara út aftur og átaka sær a›rar uppgávur, tá ein kann vísa á, at eins virki hevur arbeitt fyri eitt oljufelag. Tú hevur veri› vi› í eini oljuleiting. Ta› er ein blástemplan.

-Vil tú harvi› siga, at útlendsku feløgini mugu læra seg at liva vi›, at ta› ver›ur kanska d‡rari at brúka føroyskt vinnulív enn teir veitarar tey eru von at brúka a›rasta›ni og sum hava drúgvar royndir?

-Í lógini stendur, at ta› ver›ur eisini hugt eftir kappingarføri, so ta› er ikki fyri einhvønn prís. Líka miki› hvørja tænastu tú letur, so er ta› mest umrá›andi, at hon er í lagi. Men samtí›is ver›ur løgd áher›sla á, at tey skulu brúka føroyskt vinnulív, og feløgini ver›a eisini viga› út frá tí. Ta› ver›ur tí ein avvegan, sum oljufeløgini mugu gera.

-Men kann føroyskt vinnulív ikki liva upp til tey kvalitetskrøv, sum eru í hesi vinnu, hava oljufeløgini tá ikki sín fulla rætt til at taka av tilbo›um úr útlandinum?

-Vit mugu síggja ta› solei›is, at í eini yvirgangstí› vil ta› eisini ver›a tikin hædd fyri slíkum. Hinvegin má føroyskt vinnulív innan eina tí› hava fingi› kvalitetssikring uppá pláss og annars liva upp til tey krøv, sum oljufeløgini seta. Men man skal so heldur ikki stara seg blindan uppá hetta. Lati› okkum royna krøvini. Hvør sigur, at ta› er so ógvusligt, sum ta› ljó›ar.

Oljumálast‡ri› fylgir vi›

-Metir tú nakran vanda vera fyri, at oljufeløgini seta so hør› krøv, at føroysk virki als ikki hava nakran møguleika?

-Jú, men tey skulu javnan avrapportera til Oljumálast‡ri›, so har ber til hjá Oljumálast‡rinum at fylgja vi›, hvussu gongur og hvussu feløgini fyrihalda seg yvir fyri føroyskum vinnulívi.

Jan Mortensen vísir annars á, at ta› er Oljumálast‡ri›, sum hevur sett treytirnar, og tí er ta› eisini tess uppgáva at fylgja hesum upp. -Men vit vóna og vita eisini, at Oljumálast‡ri› koyrir hetta í tøttum samstarvi vi› vinnuna.

Sjálvur telist Jan Mortensen millum teirra, sum halda, at ta› var rætt av tinginum at seta í lógina, at alt, sum hevur tilkn‡ti til komandi oljuleiting, skal yvir føroyskan keikant og flogvøll.

-Vit høvdu havt færri kort á hondini, um ta› ikki var vi› í lógini. Tá lógin var› gjørd vóru krepputí›ir, og tí var› kravi› sera skilligt. Í dag er nærum fult arbei›i, men skulu vit koma upp í part, so er ta› eitt krav, sum ikki er órímuligt.

Forma›urin í Vinnuhúsinum heldur, at ta› er eisini t‡dningarmiki› fyri oljufeløgini, at føroyska samfelagi› og vinnan fáa ein t‡›andi leiklut í komandi oljutilgongdini. Hann heldur, at oljufeløgini eiga at líta at gongdini í alivinnuni. -Vit síggja frá alivinnuni í ø›rum londum, at hon gevur trupulleikar, tí fólki dámar hana ikki, har stórir hyljar liggja inni á fir›unum. Í Føroyum hevur eingin naka› ímóti alivinnu, har hyljarnir eru. Tí fólk vita, at hesir skapa arbei›i. Ver›ur føroyska vinnan væl involvera› í oljuvinnuni, so kann vera at altjó›a oljufeløgini fáa goodwill og uppbakking í samfelagnum, sum kann koma teimum sera væl vi› í framtí›ini. Og vónandi ver›ur talan um ein útvikling, sum fer at halda fram í mong mong ár.